# Ársins føroyingur í Gøtu

## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Strúkur í vindi ella hvassur vindur av útsynningi og ælingur, partvís vátaslettingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið hósdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útsynningi, um kvøldið hækkar hann upp í útnyrðing. Sólglottar, men um kvøldið ælingur. Hitin millum 4 og 7 stig.




**Veðrið fríggjadagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi og kavaælingur. Hitalagið millum frostmarkið og +3 stig.

**Veðrið leygardagin og sunnudagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av útnyrðingi, seinni snarar hann í landnyrðing. Kavaælingur, men eisini sólglottar og hitalagið millum 0 og ÷4 stig.

**Hundraðtals bygdarfólk tóku stóðu fyri Eivør Pálsdóttir, tá hon mánakvøldið kom til Gøtu**

Tá føroysi songlerkurin í franu viku varð kosin sum ársins føroyingur 2004, hevði Eivør ikki sjálv møguleika at vera til staðar, tá sjónliga prógvið fyri hetta varð latið. Ístaðin var tað tá mamma hennara, sum tók ímóti heiðursbrævinum.

Mánadagin kom Eivør tó til landið, og tað var ikki sørt, at gøtufólk høvdu gjørt burturúr. Bussar fóru vestur á Flogvøllin at taka ímóti, og í Eldrasambýlinum á Norðragøtu var skipað fyri móttøku.

Nýggi borgarstjórin í bygdini, Páll Isholm, flutti fram røðu, og framman fyri eini 200-300 áskoðarum framførdi annar flokku í Gøtu Skúla síðani tríggjar sangir, sum Eivør so kundi lýða á. Kórleiðari hjá børnunum var mamma Eivør, Sædis.



*Í farnu viku varð Eivør Pálsdóttir kosin ársins føroyingur, og skal metast eftir móttøkuni mánadagin, so er hon eisini ársins Gøtu-búgvi*

*Mynd: Hjørdis Gregersen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | -2 |
| Nuuk | -- |
| Qaqortoq | 0 |
| Ammassalik | 0 |
| Saint John's | -- |
| Halifax | -- |
| Reykjavík | 3 |
| Seyðisfjørður | 0 |
| Tórshavn | 3 |
| Lerwick | -- |
| Aberdeen | -- |
| London | -- |
| Tromsø | -4 |
| Bergen | 1 |
| Oslo | -- |
| Stokkhólm | -1 |
| Keypmannah. | 0 |
| Helsinki | -8 |
| Moskva | -4 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 2 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 3 |
| Paris | 5 |
| Madrid | 9 |
| Róm | 8 |
| Malorca | 11 |
| Athen | 11 |
| Malta | 15 |
| Tunis | 8 |
| Beijing | 0 |
| New Dehli | 18 |
| Bangkok | 32 |
| Jakarta | 30 |
| Sydney | -- |
| New York | 3 |
| Miami | 22 |
| Los Angeles | 16 |
| Meksikobýur | 20 |
| Panama | -- |
| La Paz | 9 |
| Rio de Janeiro | -- |
| Buenos Aires | 28 |

## LUFTTRÝSTIÐ




**Í gjár:**
Eitt lágtrýst, 986 hPa eystan fyri Ísland fer í landnyrðing og kuldabrúgvin haðani verður yvir Føroyum mikumorgunin.




**Í dag:**
Eitt lágtrýst tekur seg upp sunnan fyri Hvarvið og fer eystureftir. Tað verður væntandi við Føroyar hóskvøldið.




## HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 14/2 kl. 06⁰⁰–15/2. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 1,5°
Minsti hiti máldur í febr.: +3,7° - Mesti hiti máldur í febr.: 11,0°

## AVFALLIÐ




Avfallið: 0,0 mm – mált frá 14/2 kl. 06⁰⁰–15/2 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í februar: 50,8 mm

## VESTFALLSKYRRINDI

15. februar

7. febr. Mánin næst jørðini
16. febr. Fyrra kvarter
20. febr. Mánin longst frá jørðini

Kelda. Álmanakkin 2005

| | Suðuroyar-/ Vágafirði | | Skúvoyar-/ Skopunarfirði | | Hestfirði/ Sundalagnum | | Vestmanna-sundi | | Mykines-firði | | Nólsoyar-firði | | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi | | Leirvíksfirði/ Haraldssundi | | Kalsoyar-/ Svínoyarfirði | | Hvanna-sundi | | Fugloyar-firði | |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Dagur | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. | fp. | sp. |
| 16. feb | 00.01 | 12.38 | 11.38 | - | 11.53 | - | 02.01 | 14.38 | 03.01 | 15.38 | 10.53 | 23.30 | 09.53 | 22.30 | 00.16 | 12.53 | 01.16 | 13.53 | - | 12.23 | 01.01 | 13.38 |
| 17. feb | 01.15 | 13.53 | 00.15 | 12.53 | 00.30 | 13.08 | 03.15 | 15.53 | 04.15 | 16.53 | - | 12.08 | 11.08 | 23.47 | 01.30 | 14.08 | 02.30 | 15.08 | 01.00 | 13.38 | 02.15 | 14.53 |
| 18. feb | 02.32 | 14.57 | 01.32 | 13.57 | 01.47 | 14.12 | 04.32 | 16.57 | 05.32 | 17.57 | 00.47 | 13.12 | - | 12.12 | 02.47 | 15.12 | 03.47 | 16.12 | 02.17 | 14.42 | 03.32 | 15.57 |
| 19. feb | 03.22 | 15.47 | 02.22 | 14.47 | 02.37 | 15.02 | 05.22 | 17.47 | 06.22 | 18.47 | 01.37 | 14.02 | 00.37 | 13.02 | 03.37 | 16.02 | 04.37 | 17.02 | 03.07 | 15.32 | 04.22 | 16.47 |
| 20. feb | 04.12 | 16.36 | 03.12 | 15.36 | 03.27 | 15.51 | 06.12 | 18.36 | 07.12 | 19.36 | 02.27 | 14.51 | 01.27 | 13.51 | 04.27 | 16.51 | 05.27 | 17.51 | 03.57 | 16.21 | 05.12 | 17.36 |

Sosialurin

5 707265 100036 >